Frá sjúkrahúsverki til universitetssjúkrahús

Strategi fyri Sjúkrahúsverkið 2026-2030

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Innihaldsyvirlit

Fororð 4

Felags virðisgrundarlag fyri Sjúkrahúsverkið 5

Yvirskipað mál og leið fyri Sjúkrahúsverkið 6

Strategisku sporini 7

Sjúkugreining og viðgerð 8

1. Kliniskt uppgávubýti og sjúkrahúsprofilar 9

2. Heilsutænastur í nærumhvørvinum 10

3. Samanhangandi sjúklingagongd 11

4. Borgarainnliman 12

5. Felags visitatión 13

6. Bíðilistar 14

Nýskapan og gransking 15

7. Læringarumhvørvi 16

8. Universitetssjúkrahús 17

9. Vitlíki 18

Eitt arbeiðspláss 19

10. Dagføring og samskipan av akuttilbúgvingum 20

11. Tryggja flytiføri hjá starvsfólki 21

12. Optimering av skipanum og rakstri 22

Menning og trivnaður 23

13. Starvsfólkamenning 24

14. Eitt trygt og gott arbeiðspláss 25

15. Rekruttering 26

Fororð

Hvønn dag møta vit menniskjum í ymiskum lívsstøðum. Við væntanum, ótta, vón og tørvi á hjálp. Samstundis møta vit dugnaligum starvsfólkum, sum við dugnaskapi, umsorgan og ábyrgd taka sær av hesum menniskjum. Og tað er í hesum, at Sjúkrahúsverkið fær sítt veruliga innihald. Og her verður kósin løgd komandi árini.

Seinastu árini hevur Sjúkrahúsverkið ment seg nógv. Vit hava styrkt fakligheitina, víðkað tænasturnar og tikið týðandi stig móti einum meira nútímans heilsuverki. Samstundis sæst týðiligari enn nakrantíð, at framtíðin setur nýggj krøv. Fleiri gamlir borgarar, fleiri við varandi sjúku, skjót tøknilig menning og meiri krøv til bæði tænastur og arbeiðsumhvørvi gera tað neyðugt at hugsa longri fram og at arbeiða enn meira saman.

Við hesum strategiskjali vilja vit savna kósina sum eitt sameint Sjúkrahúsverk fram ímóti universitetsjúkrahúsi. Eitt sjúkrahúsverk, har ið borgarin upplivir okkara viðgerð og heilsutænastu sum trygga og samanhangandi. Og har ið starvsfólkið kennir seg sum part av einum felagsskapi við felags uppgávum.

Strategiin snýr seg ikki bara um skipanir, bygningar og arbeiðsgongdir. Hon snýr seg fyrst og fremst um menniskju. Um at seta sjúklingin í miðdepilin, at lurta betur, at geva greiðari kunning og at veita meiri innlit og ávirkan í síni egnu sjúklingagongd. Og um at tryggja, at Sjúkrahúsverkið er eitt arbeiðspláss, har trivnaður, faklig menning og virðing ganga hond í hond við dygd og tryggleika.

Vit vita, at ein strategi í sjálvum sær einki broytir. Tað gera vit – saman. Hetta skjalið skal vera eitt amboð, sum stuðlar undir dagliga arbeiðið og hjálpir okkum at taka góðar, samanhangandi og tryggar avgerðir. Okkara vón er, at strategiin virkar sum eitt felags grundarlag, sum vit øll kunnu spegla okkum í, og sum flytur Sjúkrahúsverkið eitt stig longur fram á leið: til gagns fyri borgaran, starvsfólkini og samfelagið.

Ein fortreyt fyri at røkka hesum málum er, at vit gera tað saman. Hvørt einstakt starvsfólk, uttan mun til fakliga bakgrund ella leiklut, er ein týðandi partur av heildini. Tað er í samspælinum millum fakbólkar, at vit veita borgaranum samanhang og dygd.

Arbeiðsbólkar verða settir at gera málini í strategiini ítøkilig og at verkseta tey. Á tann hátt verður strategiin eitt livandi amboð, sum byggir á felags ábyrgd og felags innsats.

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum

Felags virðisgrundarlag fyri Sjúkrahúsverkið

Visión, missión og virðir mynda grundarlagið undir Sjúkrahúsverkinum. Tey seta kós, skapa felags fatan og leiða okkara arbeiði í dag og í framtíðini. Saman arbeiða vit fyri eina samanhangandi og dygdargóða heilsutænastu.

Visión 2030

Eitt framsøkið sjúkrahúsverk á altjóða stigi – við menniskjanum í miðdeplinum

- Vit tryggja rættstundis sjúkugreining og viðgerð við góðari sjúklingagongd.
- Vit nýskapa og granska – og menna okkum til eitt universitetssjúkrahús.
- Vit samstarva og knýta sambond, sum vit mennast og trívast í.
- Vit eru eitt arbeiðspláss, har ið vit loysa uppgávur í felag.

Missión

Dygdargóð heilsutænasta alt lívið

- Sjúkrahúsverkið veitir heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð.
- Málið er dygdargóðar heilsutænastur, bornar av vitan og tænastusinni.

Virðir

Stev

At hava felags stev gevur styrki, sýnir samanhald og vekir álit.

Fyri at halda felags stev, mugu vit arbeiða tvørtur um mørk, deildir og fakøki. Vit eru øll javnlík, tá uppgávur skulu loysast – og fyri at koma á mál krevur tað bæði samskipan, samskifti og eina neyva kós.

Rúm skal vera fyri øllum, og vit skulu duga at gagnnýta styrkirnar hjá tí einstaka. Øll skulu kenna seg vird, og øll skulu kunna siga sína hugsan.

Í atburði merkir hetta:

- At tú í talu og verki sýnir sjúklingum og starvsfeløgum virðing.
- At tú setur teg inn í støðuna hjá tí, tú samstarvar við.
- At tú raðfestir felags mál hægri enn egin mál.
- At tú vísir toymisanda millum deildir, deplar og sjúkrahús.

Áræði

At hava áræði gevur drívmegi og skapar framburð. Fyri okkum er umráðandi at vera ágrýtin, sýna jaligan hugburð og vilja royna nýggjar leiðir. Vit skulu veita høga dygd og skjótleika.

Í atburði merkir hetta:

- At tú birtir vón og vísir á gongdar leiðir.
- At tú ert áhaldandi og vísir nærlagni.
- At tú eggjar til loysnir.
- At tú tekur ábyrgd, tá avgerðir skulu takast.

Flog

At hava flog merkir, at vit kunnu vera skapandi, hugsa víðskygt og at halda kós í broytingum, samstundis sum vit loysa okkara uppgávur.

Flog er eitt fjøltáttað hugtak, sum krevur, at vit brúka okkara hugflog, eru forvitin, koma við góðum hugskotum, mennast og skapa yvirlit. Fyri at halda flognum krevst framfýsni. Til tess krevst føði – vitan og menning.

Í atburði merkir hetta:

- At tú setur høg mál og torir at bróta upp úr nýggjum.
- At tú býður vanahugsan av.
- At tú ert móttøkubúgvin fyri broytingum.
- At tú støðugt víðkar sjónarringin.

Yvirskipað mál og leið fyri Sjúkrahúsverkið

Strategiin fyri Sjúkrahúsverkið 2026–2030 hevur til endamáls at menna eitt samanhangandi, burðardygt og dygdargott heilsuverk, har menniskja er í miðdeplinum. Ein týðandi partur av arbeiðinum verður at skapa eitt greiðari kliniskt uppgávubýti og eina greiða profilering av teimum trimum sjúkrahúsunum, soleiðis at førleikar og orka verða nýtt best møguligt. Samstundis verður dentur lagdur á at menna tænastur í nærumhvørvinum, so fleiri viðgerðir og heilsutænastur kunnu veitast nærri borgaranum.

Eitt annað kjarnuøki í strategiini er at tryggja betri samanhang í sjúklingagongdum. Hetta krevur styrkt samstarv millum primera og sekundera heilsugeiran, so sjúklingar uppliva eina greiðari og smidligari viðgerðargongd. Í hesum sambandi verður eisini arbeitt við at styrkja borgarainnliman, so sjúklingar og borgarar fáa størri ávirkan á egna heilsu og viðgerð.

Strategiin fevnir eisini um betri samskipan av sjúkrahúsviðgerð, millum annað við felags visitatión og við átøkum, ið skulu stytta bíðilistarnar í Sjúkrahúsverkinum. Samstundis verður arbeitt fyri at menna eitt sterkt læringarumhvørvi og leggja lunnar undir eina menning móti einum universitetssjúkrahúsi, har gransking, útbúgving og kliniskt arbeiði ganga hond í hond.

Nýggj tøknilig menning spælir eisini ein týdningarmiklan leiklut. Í strategiini verður tí dentur lagdur á ábyrgdarfulla og virðisøkjandi nýtslu av vitlíki, sum kann stuðla arbeiðsgongdum og betra um viðgerð og tænastur.

Eisini verður arbeiðið við at dagføra og samskipa akut-tilbúgvingar styrkt, so tryggleikin hjá borgarum verður varðveittur.

Ein týðandi fortreyt fyri øllum hesum er eitt sterkt starvsfólkagrundarlag. Strategiin leggur tí dent á at tryggja flytiføri millum starvsfólk, optimering av skipanum og rakstri, og miðvíst arbeiði við starvsfólkamenning. Somuleiðis verður arbeiðsumhvørvið sett í fokus, við atliti til bæði sálarligt og fysiskt arbeiðsumhvørvi á einum tryggum og góðum arbeiðsplássi.

At enda verður ein greið strategi fyri rekruttering ment, so Sjúkrahúsverkið eisini framyvir kann draga til sín og varðveita dugnalig starvsfólk, sum eru avgerandi fyri at veita góða og trygga heilsutænastu til allar borgarar.

Strategiin er yvirskipað og setir karmarnar fyri menningina av Sjúkrahúsverkinum. Arbeitt verður við strategi á ymiskum stigum í verkinum, har bæði sjúkrahúsleiðslan og einstøku deplar og deildir hava ein virknan leiklut í at menna, raðfesta og fremja yvirskipaðu málini.

Við støði í yvirskipaðu strategiini skal hvør depil og hvør deild gera ítøkiligar ætlanir fyri sítt øki. Hetta er sostatt eitt felags átak fyri øll í Sjúkrahúsverkinum, har ábyrgd og menning ganga hond í hond tvørtur um verkið.

Strategisku sporini

Sjúkugreining og viðgerð

- Kliniskt uppgávubýti og sjúkrahúsprofilar
- Heilsutænastur í nærumhvørvinum
- Samanhangandi sjúklingagongd
- Borgarainnliman
- Felags visitatión
- Bíðilistar

Nýskapan og gransking

- Læringarumhvørvi
- Universitetssjúkrahús
- Vitlíki

Visión 2030

Eitt framsøkið Sjúkrahúsverk á altjóða stigi – við menniskjanum í miðdeplinum

Eitt arbeiðspláss

- Dagføring og samskipan av akuttilbúgvingum
- Flytiføri hjá starvsfólkum
- Optimering av skipanum og rakstri

Menning og trivnaður

- Starvsfólkamenning
- Eitt trygt og gott arbeiðspláss
- Rekruttering

SJÚKUGREINING OG VIÐGERÐ

1. Kliniskt uppgávubýti og sjúkrahúsprofilar

Sjúkugreining og viðgerð

Endamál

Endamálið er at tryggja, at borgarin fær rætta heilsutænastu á røttum stað og við røttu fakligheit - við at gera greiðan og samanhangandi profil fyri hvørt av teimum trimum sjúkrahúsunum og Sjúkrahúsverkið sum heild.

Ein miðvís menning av sjúkrahúsunum skal tryggja, at okkara heilsutænastur eru til reiðar til at taka við avbjóðingum, m.a. við at áseta, hvussu arbeiðsmegin best verður gagnnýtt tvørtur um sjúkrahúsini.

Hvat vilja vit?

- Skipa greitt kliniskt uppgávubýti, sum styrkir fakliga dentin og tryggjar góða og samanhangandi heilsutænastu.
- Taka fyrstu stigini til at gera fakligan profil fyri tey trý sjúkrahúsini í samsvar við heilsupolitikkin, har Suðuroyar Sjúkrahús og Klaksvíkar Sjúkrahús stigvíst mennast til elektivar og ambulantar uppgávur, og Landssjúkrahúsið er akutsjúkrahús.
- Menna Sjúkrahúsverkið ímóti at verða universitetssjúkrahús.
- Brúka arbeiðsmegina og førleikarnar í Sjúkrahúsverkinum betur og smidligari. Tað skal vera lættari at gagnnýta serfrøðina tvørtur um sjúkrahúsini.
- Tryggja fakbólkum betri møguleika fyri fakligum samstarvi, javnari arbeiðsbýti og liðiligari arbeiðsdegi, m.a. við býtisstørvum.

Nær er málið rokkið?

- Tá kliniskir profilar og uppgávubýtið fyri øll trý sjúkrahúsini eru greitt lýst og staðfest í leiðsluni (og um tað er neyðugt, eisini politiskt).
- Tá starvsfólkatilfeingið verður gagnnýtt til frama fyri munadygga og samanhangandi sjúklingagongd, m.a. at tað er vanligari at tæna á fleiri matriklum.

2. Heilsutænastur í nærumhvørvinum

Sjúkugreining og viðgerð

Endamál

Endamálið er, at Sjúkrahúsverkið kann veita fleiri heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgarunum, so borgarin fær lættari og javnari atgongd til tænastur. Hetta skal bøta heilsuna hjá borgarunum og fyribyrgja sjúku.

Hvat vilja vit?

- Gera heilsutænastuna tøkari kring landið.
- Stovnseta fleiri ambulantar viðgerðir á Klaksvíkar og Suðuroyar Sjúkrahúsi, í samstarvi við Landssjúkrahúsið.
- Nýta fleiri telemedisinskar- og talgildar loysnir, so sjúklingar ikki skulu flytast millum sjúkrahúsini.
- Samstarva við Heilsumálaráðið, kommunulæknar og kommunur um at stovnseta heilsutilboð í heilsumiðstøðum, har ið tað er langt til sjúkrahús.
- Samstarva við kommunur soleiðis, at ávísar viðgerðir kunnu gerast heima hjá sjúklingunum.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið tað eru fleiri ambulant tilboð á Klaksvíkar og Suðuroyar Sjúkrahúsi.
- Tá ið sjúklingar, í teimum førum ið tað fakliga er gjørligt, kunnu velja fjarviðtalur ella aðrar talgildar loysnir.
- Tá fleiri heilsutilboð eru stovnsett í heilsumiðstøðum í nærumhvørvinum, har ið sjúklingar eru langt burtur frá sjúkrahúsum. Hesi eru m.a. blóðroyndir, fyribyrgingartilboð og sjúklingaundirvísing.
- Tá ítøkiligar avtalur eru gjørdar við kommunurnar um viðgerð heima.

3. Samanhangandi sjúklingagongd

Sjúkugreining og viðgerð

Endamál

Endamálið er at tryggja samanhangandi sjúklingagongd við góðum samstarvi og greiðum ábyrgdarbýti millum primera og sekundera geiran, so rætt viðgerð verður veitt til røttu tíð og á rætta stað – frá fyribyrging til endurvenjingar.

Tað skal verða borgaranum lættari at ferðast millum geirar, tryggja sjúklingatrygd, og minka um ótilætlaðar hendingar, bíðitíð og endurinnleggingar. Eitt amboð at røkka hesum er Talgild Heilsa.

Hvat vilja vit?

- Seta í verk greitt og bindandi samstarv ímillum primera og sekundera geiran, undir hesum felags leiðreglur fyri samskifti og uppgávubýti.
- Bøta góðskuna á ávísingum eftir felags leisti.
- Tryggja góðar epikrisur í rættari tíð við útskriving og lokna viðgerð
- Bøta samskiftið millum ymsar fakbólkar og geirar við talgildum loysnum og at nýta møguleikarnar í komandi felags heilsuskipan.
- Tryggja fakliga menning og undirvísing í at nýta felags skipanir.
- Stovna felags endurmenningar- og endurvenjingareind í Sjúkrahúsverkinum í samstarvi við Heilsu- og orkumálaráðið, kommunur og Almannaverkið.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið sjúklingagongd og samstarvsavtalur eru gjørdar og settar í verk fyri størstu sjúklingabólkarnar.
- Tá ávísingar altíð lúka felags góðskutreytirnar.
- Tá ið epikrisa altíð verður send rættstundis við útskriving og við lokna viðgerð.
- Tá talið av endurinnleggingum minkar.
- Tá ið sjúklinganøgdsemikanningar vísa, at borgarin kennir sjúklingagongdina greiða og trygga – uttan at detta niður ímillum geirar.



4. Borgarainnliman

Sjúkugreining og viðgerð

Endamál

At tryggja, at borgarar, sjúklingar og avvarðandi uppliva eitt sjúkrahúsverk, har ið tørvur, ynski og royndir borgaranna verða tikin við í viðgerðarætlanina. At heilsutænastur verða mentar við menniskjanum í miðdeplinum, sum er við til at styrkja álitið ímillum borgaran og Sjúkrahúsverkið.

Hvat vilja vit?

- Gera kunningina greiða og skilliga fyri øllum borgarum – bæði viðvíkjandi máli og mentan.
- Menna og verkseta leist, har ið borgarin fær ávirkan og valmøguleikar í síni egnu sjúkugongd – frá fyrsta sambandinum og til útskrivingar og framhaldsviðgerð.
- Útbúgva starvsfólk í háttaløgum við fyriliti fyri borgarainnliman.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið skrivlig og talgild sjúklinga-kunning er góðskutryggjað, løtt at skilja og atkomulig á teimum málum og pallum, sum borgarar nýta.
- Tá ið útbúgving í borgarainnliman er verksett.
- Tá ið sjúklinganøgdsemi batnar við-víkjandi kunning, ávirkan á sjúk-lingagongdina og uppliving av starvs-fólkinum.

5. Felags visitatión

Sjúkugreining og viðgerð

Endamál

At menna visitatiónsleist og fullfíggja felags visitatiónsskipan í Sjúkrahúsverkinum, har ið allar viðkomandi sergreinar eru við. Skipanin skal tryggja skynsama og samanhangandi handfaring av ávísingum, soleiðis at sjúklingar verða raðfestir rætt og fáa rættstundis viðgerð.

Hvat vilja vit?

- Skipa felags visitatión á teimum elektivu økjunum, undir hesum fáa parenkym og endoskopi inn í felags visitatiónskipanina.
- Gagnnýta kapasitetin í Sjúkrahúsverkinum á skilagóðan og samanhangandi hátt, til dømis við kapasitetskonferansu.
- Tryggja styttar og vælskipaðar bíðitíðir til fyrstu viðtalu.
- Styrkja sjúklingagongd og tryggja javna atgongd til viðgerðir.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið allar viðkomandi elektivar sergreinar eru partur av felags visitatiónsskipanini.
- Tá ið ávísingar verða viðgjørdar eftir felags leiðreglum.
- Tá ið kommunulæknar hava felags og greiða inngongd til ávísing.
- Tá ið kapasiteturin í Sjúkrahúsverkinum verður gagnnýttur tvørtur um eindir.
- Tá ið sjúklinganøgdsemikanningar vísa, at sjúklingar uppliva sjúklingagongdina greiðari og skjótari.

6. Bíðilistar
Sjúkugreining og viðgerð

Endamál
Við greiðum og gjøgnumskygdum bíðilistum skulu vit tryggja, at sjúklingar fáa rættstundis viðgerð eftir tørvi.

Hvat vilja vit?
- Hava felags og eintáttaða skráseting av virksemi og bíðitíð.
- Gjøgnumskygda og dagførda kunning til borgarar um bíðitíðir.
- Stytta bíðilistarnar við at ráðleggja virksemið betur og hava smidligari arbeiðsgongdir.
- Í samstarvi við Heilsu- og orkumálaráðið seta í verk viðgerðartrygd í almenna heilsuverkinum við fakliga grundaðum tíðarfreistum og skipaðari kapasitetsætlan, sum tryggjar, at málini kunnu røkkast.

Nær er málið rokkið?
- Tá ið vit hava greiða kunning um longd á bíðilistum á øllum økjum.
- Tá ið vit kunnu skjalprógva økjandi elektivar viðgerðir og styttar bíðilistar.

NÝSKAPAN OG GRANSKING

7. Læringarumhvørvi
Nýskapan og gransking

Endamál
Við at styrkja fak- og læringarumhvørvið tvørtur um sjúkrahúsini við betranarháttalagnum sum grundarlagi, skapa vit læringarumhvørvi við at knýta gransking og klinikk tætt saman. Harafturat skulu vit nýta simulatiónsvenjingar til at menna eitt læringarumhvørvi, sum stuðlar undir fakliga hugleiðing, sjúklingatrygd, tvørfakligt samstarv og fremur eitt sjúkrahúsverk í støðugari menning.

Hvat vilja vit?
- Menna eitt sterkt fakligt umhvørvi bygt á vitanarskifti, tryggleika og fakliga ráðgeving.
- At nýmótans simulatiónsvenjing verður partur av dagliga rakstrinum – bæði viðvíkjandi at venja hvørt starvsfólk sær og í toymi, sum stuðlar undir gransking og fakliga dagføring.
- Áhaldandi at menna og nýta betranarberaraútbúgvingina.
- Samstarv við altjóða netverk fyri at tryggja góðsku og rekruttering.

Nær er málið rokkið?
- Tá læring og menning eru natúrligur partur av gerandisdegnum hjá starvsfólkunum.
- Tá betranarátøk eru natúrligur partur av gerandisdegnum á øllum deildum.
- Tá simulatiónsvenjingar eru ein liður í góðskutrygging, og tá fakligar mentorskipanir eru náttúrligur partur av innleiðsluni hjá nýggjum starvsfólki.

8. Universitetssjúkrahús

Nýskapan og gransking

Endamál

Endamálið við, at Sjúkrahúsverkið verður granskingar- og universitetssjúkrahús, er at styrkja og menna Heilsuverkið við at sameina kliniskar tænastur, útbúgving og gransking. Vit skulu ala eina mentan, har ið gransking er natúrligur partur av dagliga kliniska arbeiðinum. Hetta skal styrkja yrkisføri, fremja haldføri og tryggja, at borgarar fáa nútímans og dygdargóða heilsutænastu.

Hvat vilja vit?

- Menna tætt og virkið samstarv við Fróðskaparsetur Føroya og fremja altjóða granskingar- og undirvísingarumhvørvi við denti á serføroysk fyribrigdi.
- Styrkja føroysk heilsufaklig útbúgvingartilboð og kliniska vegleiðing.
- At partar av læknaútbúgvingini verða tiknir í Føroyum, umframt at skipa serútbúgvingar til viðkomandi seroki fyri sjúkrarøktarfrøðingar og aðrar fakbólkar.
- Tryggja, at øll trý sjúkrahúsini taka lut í útbúgving og fakligari menning, og at útbúgving og gransking verða natúrligur partur av kliniska virkseminum.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið Sjúkrahúsverkið er kent sum granskingarvirkin heilsustovnur – bæði í Føroyum og úti í heimi.
- Tá ið Sjúkrahúsverkið hevur virkið samstarv við Fróðskaparsetur Føroya um útbúgving, gransking og kliniska leiðbeining.
- Tá ið nøktandi karmar og játtan til gransking og nýskapan eru í Sjúkrahúsverkinum, og 1% av rakstrarjáttanini fer til granskingar.
- Tá kandidatútbúgvingarparturin í læknavísindum er settur á stovn á Fróðskaparsetri Føroya.
- Tá vit hava eitt nøktandi tal av útbúnum sersjúkrarøktarfrøðingum og øðrum viðkomandi fakbólkum.
- Tá ið vit hava sett professarar, ph.d.-fólk og lektarar í Sjúkrahúsverkinum saman við Fróðskaparsetrinum, og víðkað samstarv er við altjóða universitetssjúkrahús og granskingarstovnar.
- Tá ið kliniskar deildir á øllum trimum sjúkrahúsunum hava virknar luttakarar í útbúgving og leiðbeining av lesandi í fleiri fakbólkum.
- Tá ið gransking gevur sjúklingum betri tænastu, starvsfólki fakliga menning og virði, og úrslit av gransking verða nýtt beinleiðis til at bøta viðgerð, sjúklingagongd og dygd í tænastuni.

9. Vitlíki

Nýskapan og gransking

Endamál

At menna og gagnnýta vitlíki sum amboð til at bøta dygd, trygd og munadygd í Sjúkrahúsverkinum. Vitlíki skal stuðla undir kliniskar avgerðir, bøta arbeiðsgongd, fyribyrgja sjúku og veita betri sjúklingagongd.

Vitlíki skal verða natúrligur partur av arbeiðsgongdini bæði í fyrisiting og á tænastuøkinum.

Hvat vilja vit?

- Økja førleikarnar í Sjúkrahúsverkinum til at arbeiða burðardygt og framkomið.
- Tryggja at nýtslan av vitlíki fer fram á ábyrgdarfullan, etiskan og fakliga ráðiligan hátt.
- Bøta um tryggleika, dygd og skjótari heilsutænastu hjá sjúklingum.
- Styrkja stuðulin til kliniskar avgerðir við royndari og prógvaðari tøkni – t.d. við dátu- og myndagreining.
- Virkið taka lut í granskingar- og menningarverkætlanum um heilsuvitlíki.
- Menna samstarv við granskingarstovnar og tøkniligar veitarar í vitlíki og heilsu.

Nær er málið rokkið?

- Tá starvsfólkapolitikkur og etiskar leiðreglur fyri nýtslu í vitlíki í Heilsuverkinum eru gjørdar.
- Tá samstarv er við Fróðskaparsetur Føroya ella tøkniligar felagsskapir innan heilsuvitlíki.
- Tá vælvirkandi skipanir við vitlíki verða nýttar til at stuðla undir avgerðir – t.d. í sjúkugreining, triagering, myndagreining, vaktætlanum og øðrum fyrisitingarligum arbeiðsgongdum.

EITT ARBEIÐSPLÁSS

10. Dagføring og samskipan av akuttilbúgvingum

Eitt arbeiðspláss

Endamál

At tryggja dagførda og samskipaða tilbúgving, sum hevur fyrilit fyri leiklutunum hjá øllum trimum sjúkrahúsunum í samsvari við Heilsupolitikkin 2026-2035 hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Hvat vilja vit?

- Samskipa felags tilbúgvingarætlan, har ið ábyrgd og uppgávur eru greitt lýstar fyri hvørt sjúkrahús.
- Dagføra útgerð, førleikar og skipanir, soleiðis at tilbúgvingin samsvarar við profilarnar hjá sjúkrahúsunum.
- Styrkja samstarv og samskifti millum sjúkrahúsini og við aðrar tilbúgvingar-myndugleikar.
- Gera venjingar og eftirmetingar til natúrligan part av arbeiðinum.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið leiklutir og ábyrgdarbýti eru greið í tilbúgvingum í Sjúkrahús-verkinum.
- Tá førleikar og útgerð samsvara við tilbúgvingarprofilin hjá øllum sjúkra-húsum.
- Tá venjingar og førleikamenning reguliga verða framdar og eftirmettar.

11. Tryggja flytiføri hjá starvsfólki

Eitt arbeiðspláss

Endamál

At menna liðiliga skipan, har ið arbeiðsorka og førleikar hjá starvsfólki í Sjúkrahúsverkinum verða gagnnýtt tvørtur um eindir. Endamálið er at tryggja, at borgarin fær rættu tænastu á røttum stað og rættstundis við støði í fakligari dygd og tryggleika.

Hvat vilja vit?

- Menna eina skipan í Sjúkrahúsverkinum, har starvsfólkið flytur seg, so at borgarin fær eina samanhangandi og dygdargóða heilsutænastu
- Gagnnýta førleikar og arbeiðsorku, har ið tørvurin er, samstundis sum dentur verður lagdur á fakliga styrki og trivnað.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið starvsfólk flytur seg eftir tørvi og er fakliga trygt millum eindir og sjúkrahús.
- Tá ið borgarar fáa heilsutænastu í samsvari við sjúkrahúsprofilarnar

12. Optimering av skipanum og rakstri

Eitt arbeiðspláss

Endamál

At tryggja, at tøknin, tól og skipanir eru eins, samskipað og á sama stigi og kunnu samvirka. Hetta fyri at tryggja burðardyggan rakstur, høga sjúklingatrygd umframt javna og góða dygd í Sjúkrahúsverkinum.

Hvat vilja vit?

- Bøta sjúklingatrygdina við at minka um óvissur og byrgja fyri mistøkum.
- Fremja javna og góða dygd í øllum Sjúkrahúsverkinum, so sjúklingar fáa somu góðu viðgerð, sama hvar í verkinum teir eru.
- Fáa lættari samstarv og samskifti millum fakbólkar og eindir við felags skipanum og tólum.
- Tryggja burðardyggan rakstur, har ið vit nýta tilfeingið skynsamt og á skilagóðan hátt.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið MyMedCard-skipanin er verksett í øllum Sjúkrahúsverkinum, og vit hava felags leiðreglur við staðbundnum fyriliti.
- Tá ið vit brúka ÓTH-skipanina meira og á sama hátt í øllum Sjúkrahús-verkinum til tess at læra og byrgja fyri at endurtaka mistøk.
- Tá ið medicotekniska tólaparkin er samskipað og bygd eftir sama leisti.
- Tá ið innkeypið er betur skipað, og vit fáa meira fyri minni.

MENNING OG TRIVNAÐUR

13. Starvsfólkamenning

Menning og trivnaður

Endamál

At tryggja skipaða og haldføra førleikamenning hjá starvsfólki. Menningin skal styrkja fakliga dygd, tænastusinni og trivnað.

Hvat vilja vit?

- Eggja til eina arbeiðsmentan, har vitanarskifti og læring verða stuðlað og virðismett.
- Gagnnýta kunnleika í verkinum, so hann verður fleiri til gagns.
- At hvør depil ella deild ger ætlan fyri førleikamenning á sínum øki.
- Í samstarvi við Heilsu- og orkumálaráðið orða eina felags heildarætlan fyri førleikamenning og útbúgving í heilsuverkinum.

Nær er málið rokkið?

- Tá ið førleikamenning er vorðin atkomuligari hjá øllum starvsfólkabólkum.
- Tá ið førleikamenning er natúrligur og sjónligur partur av arbeiðsdegnum og sæst aftur í dygd, tænastusinni og samanhaldi millum starvsfólk.
- Tá ið starvsfólkið kennir trivnað, fakliga menning og virðing fyri sínum førleikum.

14. Eitt trygt og gott arbeiðspláss
Menning og trivnaður

Endamál
At skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har starvsfólk trívast og kenna seg trygg – bæði sálarliga og fysiskt. Eitt gott arbeiðsumhvørvi stuðlar undir, at starvsfólk kunnu røkka fakligum málum – samstundis sum tað ger arbeiðsgleðina størri hjá starvsfólkum og stuðlar undir dygdargóða tænastuveiting til borgarar.

Hvat vilja vit?
- Fremja eina mentan, har tosað verður opið og virðiliga um sálarliga arbeiðsumhvørvið, og har fyribyrgjandi átøk verða sett í verk, áðrenn trupulleikar gerast ov stórir.
- Tryggja, at arbeiðsumstøður, útgerð og arbeiðsskipanir stuðla undir gott fysiskt arbeiðsumhvørvið.
- Menna leiðslu og starvsfólk í førleikum at fremja trivnað, samskifti og at handfara ósemjur og strongd.

Nær er málið rokkið?
- Tá ið starvsfólkið kennir arbeiðsplássið trygt, virðiligt og viðurkennandi.
- Tá ið trivnaðarkanningar og samrøður við starvsfólk vísa tryggleika og arbeiðsgleði.
- Tá sálarligt og fysiskt arbeiðsumhvørvi er ein fastur og virkin partur av menningini av arbeiðinum í Sjúkrahúsverkinum.

15. Rekruttering
Menning og trivnaður

Endamál
Sjúkrahúsverkið skal verða kent sum eitt gott arbeiðspláss, har fólk vilja fáa starv og støðast.

Hvat vilja vit?
- Draga at okkum og varðveita væl útbúgvin starvsfólk, soleiðis at dygdin í dagliga arbeiðnum gerst enn betri.
- Gera funktiónslýsingar fyri øll størv, áðrenn tey verða lýst leys.
- Fáa øll starvsfólk í Sjúkrahúsverkinum at merkja, at tey eru partur av einum felagsskapi og hava eitt innihaldsríkt starv.
- Hava eitt arbeiðspláss, har trivnaðurin er høgur.
- Gagnnýta dátur frá “mynstran og avmynstran”, sjúkrafráveru og trivnaðarkanningunum.

Nær er málið rokkið?
- Tá ið Sjúkrahúsverkið megnar at manna størvini við væl útbúnum starvsfólki.
- Tá ið trivnaðarkanningar vísa, at starvsfólk trívast væl.

Landssjúkrahúsið
J.C. Svabosgøta 41-49
100 Tórshavn
+298 30 45 00
ls@ls.fo

Klaksvíkar Sjúkrahús
Sjúkrahúsbrekka 1
700 Klaksvík
+298 45 45 45
ks@ks.fo

Suðuroyar Sjúkrahús
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri
+298 34 33 00
ssh@ssh.fo

www.sjukrahus.fo